GJALDSTOVAN

# Verkætlanarleiðari við tev fyri samskifti til heimasíðuverkætlan

Gjaldstovan fevnir í dag um eitt fjølbroytt og vaksandi virksemi, har kunning og samskifti við okkara viðskiftafólk og samstarvsfelagar er av alstórum týdningi. Eitt týðandi amboð í hesum samskifti er okkara heimasíður. Vit hava tørv á at endurhugsa og endurnýggja hesar síður fyri á ein lættan og greiðan hátt at allýsa tær tænastur, sum Gjaldstovan veitir og hvør Gjaldstovan er.

Gjaldstovan hevur í dag fleiri ymiskar heimasíður.

- Høvuðssíðuna gjaldstovan.fo, sum fevnir um nógv og stór virkisøki, eisini alt virksemið hjá KT Landsins/Landsnet
- Síðurnar, sum eru partur av Talgildu Føroyum, t.e. talgildu.fo, samleikin.fo, vangin.fo og heldin.fo
- keypsportal.fo, sum Innkeyp Landsins umsitur
- rokningaportal.fo, sum verður brúkt til talgildar rokningar
- innannet

Umframt hetta er Gjaldstovan eisini ein virkin partur av heimasíðuni KT-trygd.fo

## Uppgávan

Tørvur er á verkætlanarleiðara at standa fyri verkætlan, hvørs høvuðsmál er at endurhugsa og endurnýggja heimasíðu-teyggjuna hjá Gjaldstovuni. Høvuðsuppgávan er verkætlanarleiðsla, men eisini er neyðugt at hava tev fyri samskifti og duga væl at skriva og skjalfesta.

Talan er um hesar partsuppgávur:

**Verkætlanarleiðsla:**

- Leggja verkætlanina til rættis
- Evna verkætlanartilgongd og leggja ætlanir fyri verkætlanina
- Leiða verkætlanartoymið
- Kravfesta nýggju heimasíðurnar
- Samskipa veitingar frá lyklapersónum á Gjaldstovuni og veitarum
- Standa fyri at orða útboðstilfar og leiða útboðstilgongd
- Hava samskifti við veitara, sum skal standa fyri at menna
- Standa fyri at seta í verk nýggju heimasíðurnar
- Hava fíggjarliga ábyrgd fyri verkætlanini
- Skipa fyri verkstovum og kunningarfundum
- Annað í sambandi við verkætlanina.

GJALDSTOVAN

**Skriva og miðla:**

- Hjálpa at orða ein politikk fyri heimasíðurnar
- Vera við til at skriva tilfar, sum skal leggjast á heimasíðurnar
- Greina, lýsa og skjalfesta verandi virksemi, í tøttum samstarvi við ymsu deildirnar
- Veita deildunum hjálp og afturboðan, at orða greitt, hvørjar tænastur verða bjóðaðar

Gjaldstovan arbeiðir við at bjóða nýggjar KT-tænastur til skúlar, nevnt Skúlanet. Vit hugsa, at tú í fyrstani fyrst og fremst brúkar tíð saman við teimum, sum arbeiða við Skúlaneti, at allýsa hesa tænastu.

## Tímatal og staður

Ætlanin er, at nýggju heimasíðurnar skulu verða tiknar í nýtslu áðrenn 1. februar 2022. Uppgávan er bæði verkætlanarleiðsla og fleiri útførandi verkætlanaruppgávur, m.a. at umskriva og skriva nógv av tilfarinum. Tí er talan um umfatandi uppgávu.

Tímatalið er sett at vera uml. 800 tímar í virknari arbeiðstíð fram til 1. februar 2022. Verkætlanarleiðarin leggur sjálvur sína arbeiðstíð til rættis, men av tí, at talan er um nógv samskifti við verkætlanarbólk og aðrar áhugapartar á Gjaldstovuni, er arbeiðsstaðurin fyrst og fremst Gjaldstovan. Verkætlanarleiðarin skal eisini góðtaka, innanfyri rímiligt mark, at arbeiða skiftandi tíðir, um tað gert neyðugt.

Útgreinaður sáttmáli, ið lýsir umstøðurnar fyri verkætlanina, verður gjørdur við tann, sum vinnur útboðið.

## Krøv

Tað er eitt krav, at verkætlanarleiðarin er navngivin persónur. Er talan um fyritøku, ið velur at bjóða, so skal vera viðmerkt, hvør persónurin er, ið skal standa fyri uppgávuni.

Verkætlanarleiðarin skal byrja skjótast til ber.

Tað er umráðandi, at verkætlanarleiðarin arbeiðir skipað og hevur góð samstarvs- og samskiftisevni, umframt at hava gott innlit í samskifti og duga væl at skriva. Tað er ein stórur fyrimunur at hava royndir at leiða líknandi heimasíðuverkætlanir.

Verkætlanin hevur nógvar áhugapartar, og í sambandi við royndir og førleikar hjá verkætlanarleiðaranum, er hetta partur av vektingini:

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

- Royndir við verkætlanum á líknandi stigi seinastu árini
- Royndir við at byggja og viðlíkahalda heimasíður
- Kennir væl CMS skipanir, og dugir og hevur royndir at umsita slíkar
- Royndir at standa fyri greiningararbeiði, og kennir til ástøði innan greining
- Dugir væl at skriva føroyskt og enskt
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt, dugir at leiða og at arbeiða í toymi
- Hevur viðkomandi útbúgving.

## Krøv til tilboð

Í tilboðnum skal vera upplýst:

- Navn og lívsrensl (CV) hjá ráðgeva
- Navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku
- Prísur pr. tíma uttan MVG
- Frágreiðing um, hvussu krøvini nevnd omanfyri, verða lokin
- Frágreiðing um aðrar viðkomandi útbúgvingar, vitan og royndir
- Hvørjar viðkomandi kundar, verkætlanarleiðarin hevur havt og hvørjar viðkomandi uppgávur, ráðgevin hevur loyst.

## Tíðarfreistir og ábyrgd

Tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin: gjaldstovan@gjaldstovan.fo, innan týsdagin 1. juli 2021 kl. 15. Vegna summarfrí verður miðað eftir at hava sáttmála undirskrivaðan tíðliga í august 2021.

Eru spurningar til útboðstilfarið og uppgávuna, so ber til at venda sær til Duritu Tausen á tel. 214954 ella í teldupostinum durita.tausen@gjaldstovan.fo. Allir spurningar skulu sendast inn skrivliga innan hósdagin 23. juni 2021 kl. 15. Allir spurningar verða kunngjørdir dulnevndir á Keypsportalinum.

## Vekting og val av ráðgeva

Gjaldstovan tilskilar sær rætt, í samráð við tann ið letur inn tilboð, at venda sær til aðrar kundar ella fyrrverandi leiðara hjá tilboðsgevara fyri at fáa ummæli.

Koma Gjaldstovan og tann, sum hevur besta tilboðið, ikki á mál við at gera sáttmála, so kann Gjaldstovan taka tingingar upp við tann, sum stendur næstur í røðini.

Innkomin tilboð, sum lúka minstu krøvini, verða vektað eftir prísi og førleikum. Prísur telur 50% og førleikar telja 50%.

GJALDSTOVAN

Øll tilboð fáa stig fyri prís og førleikar, millum 0 og 50 stig hvørt. Tilboðið við lægsta prísinum fær 50 stig og restin fær so stig í mun til lægsta prís. Er tímaprísurin lægri enn 600 kr./tíman uttan MVG, verður hann í samanberingini við aðrar settur til 600 kr.

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO